Seks universitetsrektarar halda fund í Føroyum

- Fróðskaparsetrið kundi í samarbeiði við teir føroysku politikkarnar verið við til at gjørt Føroyar til eitt sjálvstøðugt land, heldur Guðmund Haraldson, vararektari á Háskóla Íslands. Guðmund og aðrir rektarar úr ávíkavist Grønlandi, Danmark og Noregi luttaka í hesum døgum á eini verkstovu fyri rektarar í útnorði, sum Fróðskaparsetur Føroya í skipar fyri

RÁÐSTEVNA
Ingrid Bjarnastein

Í gjár og í dag er ein sokallað verkstova í nýggju hølunum á sjómansskúlanum í Havn. Orðið verkstova kemur av enska orðinum "workshop", og er talan er um eitt slag av arbeiðsfundi har samskiftað verður um felagsmál og áhuga hjá hesum ymsu universitetunum. Eisini eru áhoyrarar frá ymsum skúlum og stovnum við.

- Ætlanin við verkstovuni er at tosa um felagsmál og áhuga og harvið upplýsa hvønn annan við teimum broytingunum, sum fara fram í samfelagnum ,og hvussu universitetini eru noydd at laga seg hareftir, sigur Malan Marnersdóttir, rektari á Føroya Fróðskaparsetri.

- Vit eru jú í eini broytingar tíð, og verða hesar broytingar tiknar upp á verkstovuni. At samfelagið er við at broytast il eitt KT-samfelag gevur eisini universitetunum nýggjar avbjóðingar av tí, at tað eru jú tey, ið útbúgva fólkini til samfelagið, sum tað er í dag, greiðir Malan Marnersdóttir frá. — At granska og undirvísa er jú definitiónin av einum universiteti, og eru vit noydd til at útbúgva fólk júst til hetta.

Fróðskaparsetrið granskar fyri tað mesta mál, søgu og náttúruvísindi, men nú KT-samfelagið er við at vinna fram noyðist eisini Fróðskaparsetrið at leggja størri dent á tann tøknifrøðiliga partin. Hetta fyri at skapa arbeiðsorku til virkini og yvirhøvur fyri at vera før fyri at skapa nakað nýtt. - Tað er jú av alstórum týdningi at føroyingar sjálvir eisini eru førir fyri at útbúgva fólk t.d til gransking til nýggjar útflutningsvørur, heldur Malan Marnersdóttir

- Bert orðaskifti í sær sjálvum er gott, og skal hetta verða við til at útbyggja og útinna teir tankar og tey hugskot, ið vit hava, fyri at útbúgva menniskjuna til tað, sum vit vilja hava, greiðir Malan Marnersdóttir víðari frá.

Hetta við norðurlendskum stevnum sum hesari er als ikki nakað nýtt í sær sjálvum. Fróðskaparsetrið luttekur ofta við á fundum og ráðstevnum, ið eru í norðurlondum. Men tær snúgva seg ikki bert um júst hetta evnið. —Til dømis eru vit við á fundum um fígging og stýring av universitetum, men at hetta orðaskiftið er í Føroyum er avbera gott, tí so fáa vit tað inn til okkum sjálvi, fortelur Malan Marnersdóttir at enda

Gudmund Haraldsson, íslendskur vararektari við føroyskari konu

Malan Marnersdóttir, føroyskur rektari

Háskóli Íslands 90 ár á baki

Umboðið fyri universitetið í Reykjavík er Guðmund Haraldson, vararektari.

- Universitetið í Reykjavík varð stovnað í 1911. Tá vit byrjaðu vóru bert 45 studentar, og teir vóru allir menn. Í dag ganga 7000 studentar á universitetinum, harav 61% eru konufólk, sigur Guðmund Haraldson.

Háskóli Íslands hevur 11 ymiskar megindeildir. Tann størsta av teimum er hugvísindadeildin. Tá universitetið byrjaði í 1911 vóru bert 4 deildir. Á universitetinum arbeiða í dag umleið 3000 fólk, og er hetta størsta arbeiðsplássið í øllum Íslandi.

- Universitetið í Reykjavík var ein av hornsteinunum til at gera Ísland til eitt sjálvstøðugt land, greiðir Guðmund Haraldson frá. - Fróðskaparsetrið kundi í samstarvi við teir føroysku politikkarnar verið við til at eisini gera Føroyar til eitt sjálvstøðugt land.

Giftur í Føroyum

Sjálvur hevur Guðmund Haraldson føroyska konu úr Suðuroy. Hann hevur sjálvur arbeitt tvey ár á bedingini í Vági, tá hann gekk í student.

- Eg eri í Føroyum hvørja ferð høvi býðst. Hetta er eitt gott stað at taka sær av løttum og sleppa undan tí vanliga universitetslívinum. Tað er ógvuliga gott at ganga túrar í fjøllunum og fiska, og harafturat er luftin so góð, sigur Guðmund Haraldson.



Sp/f Snaraløkur í nýggj hús í Runavík

-Vit manglaðu høli, tí bygdu vit hendan bygningin í Runavík, sigur Jónsvein Knudsen á Glyvrum, sum er stjóri á reiðarínum Sp/f Snaraløki

HÚSABYGGING
Ingrid Bjarnastein

Síðani november mánaða í fjør hevur verið rættiligt rok í miðbýnum í Runavík. Tað var nevniliga tá, at Sp/f Snaraløkur , ið áðrenn helt til niðri á bryggjuni í bygninginum hjá Skipafelagnum, fór í holt við byggingarnar til eini nýggj hús. Hetta nýggja húsið er ætlað at hýsa skrivstovum hjá reiðarínum. Húsið stendur mitt í millum húsini hjá arbeiðarafelagnum Hæddini og bygningin har Miklagarður og Elding halda til. Nú er húsið so klárt at taka í nýtslu, og í gjár var almenn móttøka í nýggju, snotiligu húsunum.

1125 m²

Húsið telist so avgjørt ikki millum tey smærru. Eini vanlig sethús eru umleið 130 m², meðan bygningurin hjá Snaraløki er heilar 1125 m², og kann hetta sigast at vera ógvuliga stórt til eina einkulta fyritøku.

- Vit brúka ikki alt plássið sjálvir, sigur Jónsvein Knudsen. — Hetta varð eisini nógv størri enn ætlanin var, men vit leiga hølir út til Føroya Tele og grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe. Eisini hevur Runavíkar kommuna eina goymslu í kjallaranum. Tað kann vera, at onkur fyritøka afturat kemur at flyta inn í húsini seinni.

Hetta er fyrsta deildin Føroya Tele letur upp í Runavík, og er tað ein av teimum sokallaðu Telebúðunum. Telebúðin í Eysturoynni var áðrenn í Søldafirði á telefonstøðini har. Hendan Telebúðin er nýmótans innrættað, og skulu hinar Telebúðirnar kring landið innrættast eins og hendan.

Helvtin av kjallaranum verður brúktur til skipini hjá reiðarínum. Snaraløkur eigur partrolararnar Topas, Sardis, Jaspis, Ametyst og Smaragd. Umframt hesar fimm trolararnar rekur Snaraløkur fýra skip fyri Bjarta Mohr.

Jónsvein Knudsen

Ikki eitt ár at byggja

- Farið var undir at byggja seint í november mánaða í fjør, greiðir Jónsvein Knudsen frá. — Tað er TN Bygging av Glyvrum, ið hevur staðið fyri tí mesta av byggingini. Tilfarið hava vit fingið ymsastaðni frá. Td eru elementini úr Gjógv, meðan allur innimaturin kemur úr Danmark.

Kostnaðin at byggja húsini vil Jónsvein Knudsen ikki rættiliga úttala seg um. Men hann vil siga so mikið sum tað, at teir eru væl nøgdir við kostnaðin.